

# THE SOUND OF BRANDAN

HOTEL
BRANDAN
★★★★










# THE SOUND OF BRANDAN ER...

.. EIN FULL MATSTOVA AV GESTUM, IÐ HUGNA SÆR

.. KUFFERTINI, IÐ RULLA INN Í MÓTTØKUNA

.. "JA TAKK!" Í KØKINUM

.. LÁTURIN Í STARVSFÓLKARÚMINUM

.. PRÁTIÐ Í LANDMARK

.. EITT REINT OG KLÁRT KAMAR

.. VEITSLURNAR Í MEKSIKO

## SAMAN ERU VIT - THE SOUND OF BRANDAN

# INNIHALDSYVIRLIT


Okkara søga 3
Missión, visjón og virðir 4
Green key 5
Okkara hentleikar 6








Á gólvinum 7
Eitt komplett upplivilsi 8
Gestablídni 9
Trupulleikar 11
Trivnaður 12



Gott til pubquiz 13
Vælkomin á okkara lið 14






# OKKARA SØGA

HOTEL BRANDAN LAT DYRNAR UPP Í 2020, OG ER EITT GRØNT 4-STJØRNAÐ SUPERIOR HOTELL.

Navnið er komið frá írska munkinum og ævintýrarinum, Sankta Brandan, ið var fyrsti navnnevndið maður, ið kom til Føroyar.

Staðsetingin er framúr góð, bert fáar minuttir til gongu frá miðbýnum, SMS og alskyns ítróttahentleikum.

Umstøðurnar á hotellinum eru góðar. Her eru 124 kømur, 4 fundarhøli, sauna, venjingarhøli, heitir pottar og 100 parkeringspláss, umframt fýra løðistøðir til EL-bilar.

# MISSIÓN

*Vit verja náttúruna - so tú sleppur at uppliva hana.*

Á Hotel Brandan veita vit eina fyrstafloks tænastu, har gesturin fær eina kenslu av Føroyum í einum grønum umhvørvi.
Náttúran og føroyski samleikin er okkara sermerki.

# VISJÓN

Vit ynskja framhaldandi at veita eina serstaka, grøna og føroyska tænastu.

# VIRÐIR

Grønar loysnir – vit taka ábyrgd av okkara umhvørvi.

Gestablídni - vit skulu vera tann besti verturin fyri gestin.

Tænasta - vit vilja veita eina professionella blíða tænastu.

Trivnaður- vit ansa eftir hvørjum øðrum, tí vit mennast og vaksa til ein sterkari hóp, um vit trívast í tí vit gera.














# GREEN KEY HOTELL Í TÓRSHAVN

Vit á Brandan eru góð við umhvørvið, og vilja gera alt fyri at verja tað. Grønar loysnir eru millum annað, at vit einki einnýtistilfar og einki plast brúka. Vit nýta svanamerktar sápur, fjarhita og eisini seta vit krøv til okkara veitarar um at nýta grønar loysnir.

Við at hugsa umhvørvið í øllum vit gera, hava vit fingið Green Key umhvørvis merkið.
Vit høvdu sett stóran prís á um tú, saman við okkum, deildi Green Key boðskapin við gestirnar.
Tað gera vit m.a. við at greiða gestinum frá, at vit brúka pappírsúgvirør, hava økologiskar vørur og flyta okkara vín við toki.



# OKKARA HENTLEIKAR

4-stjørnað superior ráðstevnuhotel

Matstova

Kafé

Venjingarhøli

Íroknað morgunmat

Green Key

3 min. frá miðbýnum

2 min. frá SMS

Skjóttgangandi internet

Hitapottar

Hitarúm

Ókeypis parkering



# Á GÓLVINUM

TÁ TÚ ERT TIL ARBEIÐIS.

Tú kanst vænta, at fáa eymar føtur teir fyrstu dagarnar
- her viðmæla vit tær einar góðar skógvar, og eitt heitt fótabað, mmmh!

Tú kanst vænta, at fáa spurningar um ting, tú ikki veitst
- men teir skalt tú nokk klára at lofta, vit hjálpa tær.

Tú kanst vænta, at fáa góðar starvsfelagar, sum tú gleðir teg at koma til arbeiðis saman við.

Tú kanst vænta, at tú kemur at arbeiða skjótt og undir trýsti.

Tú kanst vænta, at hvør dagur hevur eina nýggja, spennandi avbjóðing.





## SOLEIÐIS FÆR GESTURIN EITT KOMPLETT UPPLIVILSI

VER TANN BESTI TÚ HVØRJAFERÐ!

Tjekklistin til tann góða vertin:

Tá gestir tjekka inn, fortel teimum um allar hentleikarnar vit hava.
- Heitu pottarnir, Landmark barrina og Húsagarð matstovuna.
Spyr, um tey ynskja at bóka pláss.

Tosa altíð um okkara hentleikar á ein jaligan hátt.

Spyr, um gesturin ynskir sær okkurt afturvið drykkivørunum í barrini
- Gesturin verður glaður fyri uppmerksemið, og vit glað fyri meirsøluna.

Um gesturin ynskir at bíleggja borð í matstovuni, men har er fult, bjóðað teimum so borð eitt annað kvøld í staðin.
- Vís fegin til aðrar matstovur í samtakinum, sum Katrinu Christiansen og Kafé Kaspar.

Óansæð hvar á hotellinum tú møtir einum gesti, gev honum so altíð eitt smíl - Sær hann spyrjandi út, spyr um tað er eitt hvørt tú kanst hjálpa honum við



# GESTABLÍDNI

VIT YNSKJA, AT GESTIRNIR HJÁ OKKUM ALTÍÐ MERKJA, AT TEIR VERÐA MÓTTIKNIR VIÐ TÍ EYÐKENDA, FØROYSKA GESTABLÍDNINUM.

Gestir skulu kenna seg vælkomnar hjá okkum óðansæð hvørji tey eru.
Vit elska at vera um gestin, og royna altíð at gera sambandið við gestin persónligt. Vit práta, flenna og lurta saman við gestinum. Vit eru tann trúfasti vinurin, hin hjálpandi hondin og hin stuttligi makkarin. Royn og fanga stemningin, ver í løtuni og kom við onkrum góðum. Vís teimum tína persónligheit.

Tú umboðar hotellið og tað gert tú best við einum smílið, eygnakontakt og eina heilsan til gestin.



# TRUPULLEIKAR?

VIT LOYSA TEIR SAMAN

## ÓNØGDIR GESTIR :(

Tá vit tosa við ein gest, ið ikki metir, at hann fekk tað hann væntaði, er tað okkara ábyrgd at loysa hetta saman við gestinum.
Vit vilja gjarna vísa á trý punkt, ið tú kann hava í huga, tá tú skal loysa ein trupulleika.

## *LURTA - VIÐURKENN & FINN EINA* LOYSN

Tað er av størsta týdningi, at gesturin følir seg hoyrdan, og at vit viðurkenna trupulleikan. Vit finna altíð eina loysn, so gesturin verður nøgdur aftur.

## EITT FITT DØMI *UM HVUSSU TÚ LOYSIR EIN TRUPULLEIKA , IÐ IKKI ER Á TÍNUM POSTI*

"Tú serverar til morgunmatin og ein gestur fortelur tær, at heita vatnið í brúsini ikki riggaði í morgun. Her fært tú ein góðan møguleika at loysa trupuleikan fyri gestin, uttan at vera rørleggjari. Tú kanst geva boðini viðari til móttøkuna, so tey kunnu flyta gestin í eitt nýtt kamar, ella fáa húsavørðin at orna brúsina. Um gesturin enn ikki hevur fingið hitan í seg aftaná kalda brúsibaðið í morgun, so kanst tu eisini bjóða honum ein heitan café latte afturvið morgunmatinum".

## '112'RÁÐ TIL EIN 'OFF' DAG

Vit eru øll menniskju, og hava av og á ein 'off' dag. Her eru nøkur ráð til, hvussu tú kanst venda einum ringum degi, so gesturin sleppur at síggja tína bestu síðu.

Tosa við tínar starvsfelagar, onkur av teimum veit heilt sikkurt eina góða ella tvær :)

Fá tær eitt glas av vatni og gleð teg til starvsfólkamatin

Tosa við gestirnar og fortel teimum, um eina góða uppliving teir kunna fáa her í Føroyum.





## KLÆÐIR

Vit hava flottar starvfólkabúnar til øll okkara starvfólk. Um farvan ikki hóskar til tíni eygu, so ivast vit ikki í, at tú sært gott út kortini.

## SOSIALIR MIÐLAR

Vit elska, tá tú snappar og taggar okkum á sosialu miðlunum - **í tínari frítið ;)**

## ROYKING

Roykir tú, verður tað gjørt í vørumóttøkuni.
Psst.. *Eau de øskubikar* er ikki besta luktilsi. Lat teg tí í egið plagg áðrenn, og vaska hendur aftaná. Royking gongur fyri seg í generellu pausunum.





# Let's celebrate and have a good time!

## TRIVNAÐUR

VIRÐILIGT SAMSKIFTI
FREMUR GÓÐAN TRIVNA

Tað er fantastiskt at arbeiða á einum arbeiðsplássi við so nógvum ymiskum starvsfólkum, ið saman skapa eina fantastiska uppliving fyri gestunum.
Á Brandan arbeiða kokkar og tænarar, barrvørðar og uppvaskarar, móttøkufólk og reingerðarfólk, húsavørar o.o.

Tí er gott at minnast, at tá hotellið koyrir við fullari ferð, er umráðandi at halda samskiftið á einum siðiligum støði, hóast nógv stendur á.

## OPINLEIKI - SIG OKKUM FRÁ

Vit basa á bestan hátt trupulleikunum, um teir koma framm beinavegin.

## VIT YNSKJA, AT TÚ MENNIR TEG HJÁ OKKUM

Vilt tú meira innan tænastuvinnuna, er hetta ein genial byrjan. Her eru nógv ymisk arbeiðsøki, og tað er skjótt hjá teimum røsku at fáa ábyrgd.

## STARVSFÓLKAÁGÓÐAR

Tryggja tær, at tú kennir allar starvsfólkaágóðarnir, hesir koma nokkso væl við ;) Práta við tín nærmasta leiðara.

# GOTT TIL PUBQUIZ

## VISTI TÚ AT...

... hvørt kamar í húsinum er uppkallað eftir einum føroyskum varða?
Ein mynd av hvørjum einstøkum varða er eisini í kamarinum har varðin hoyrir til.

... í vælkomumappuni á kamarinum ber til at skanna eina QR kotu og fáa rutuvegleiðing til varðan. Tað er eisini møguligt at bíleggja ein privatan gongutúr til varðan saman við Pól Sundskarð.

... 30% av víninum hjá okkum er vistfrøðiligt?






... borðið í vínkjallarinum er 70 ára gamalt og kemur úr Kuba?

... á gólvinum beint við barrina er eitt merki, ið tú kanst stilla teg á, taka eina selfie og fáa allan tann vakra Edvard Fuglø málningin við í bakgrundini.

... Húsagarður er uppkallað eftir húsunum, ið fyrr stóðu á økinum har Hotel Brandan stendur nú? Myndirnar av húsunum hanga eisini runt í matstovuni og í gongini.




# VÆLKOMIN Á OKKARA LIÐ

NÚ TÁ EINGIN IVI ER Í HVAT THE **SOUND OF BRANDAN** ER;

FARA VIT VÍÐARI TIL POLITIKKINAR OG REGLUR.

TÆR SÍÐURNAR, KUNNA TÝKJAST EITT SINDUR TURRAR - MEN VIT LOVA AT TAÐ ER VIKOMANDI

# SETANARVIÐURSKIFTI

## ÁÐRENN TÚ BYRJAR Í STARVI

Áðrenn fyrsta starvsdag fært tú útflýggjað eina leinkju til eitt skjal tú skal fylla út.  Á tínum fyrsta arbeiðsdegi verður tú móttikin av einum starvsfelaga, sum syrgir fyri, at tú fært eina góða byrjan.

Tú stemplar teg inn/út frá arbeiði á Planday. Á Planday sært tú vaktarskipanina, hvussu nógvar tímar tú hevur arbeitt, boð frá leiðaranum, tínar starvsfelagar, umbýting av vaktum, ynskir um feriu v.m.

Stemplast skal, tá møtt verður til arbeiðis, og somuleiðis, tá liðugt er at arbeiða. Fyri ein arbeiðsdag verður ein hálvur tími trektur frá fyri mattíð.
Tá privat ørindi verða gjørd, t.d. læknaørindir og annað, skal stemplast út . Stemplað verður inn aftur, tá komið verður aftur til arbeiðis. Starvast tú á meira enn einari deild, minst so til at skráseta teg á røttum deildum.



## TÁ VIT MØTA TIL ARBEIÐIS

Tað er sera umráðandi, at vit sum starvsfólk eru umhugsin viðvíkjandi reinføri á hotellinum og eisini okkara egna persónliga reinføri

- Starvsfólk møta til arbeiðis væluppløgd og fyrikomandi·
- Starvsfólk møta til arbeiðis í reinum, penum búna og skóm.
- Prýðislutir, smyrsl og neglalakk skal vera neutralt og skegg væl røktað
- Starvsfólk, sum arbeiða við mati og hava langt hár, seta hárið upp. Starvast tú í køkinum ella sum tænari, skal hædd takast fyri ringum, oyralokkum og neglalakki.





# STARVSFÓLKABÚNAR

## TÆNARAR

- Kvinnur: Skjúrta, buksur, kjóli
- Menn: Myrkabláar buksir, skjúrta og slips

Tú verður biðin um sjálv/ur at møta til arbeiðis í svørtum skóm og svørtum hosum/nylonsokkum.

## KOKKAR

Fáa klæðir frá Brandan hvønn dag. Tú móttekur og letur skitin klæðir inn (eftir arbeiðstíð) Brandan vaskar klæðini fyri kokkarnar. Tú skalt sjálv/ur syrgja fyri t-shirt og trygdarskóm, og tú kanst taka tínar egnu knívar við.

## GONGSFÓLK

Fáa vest og tshirt frá Brandan hvønn dag, og Brandan vaskar tað fyri teg. Tú skalt sjálv/ur syrgja fyri svørtum/myrkabláðum buksum og svørtum skóm.

## MÓTTØKUFÓLK

- Kvinnur: Skjúrta, buksur, kjóli
- Menn: Myrkabláar buksir, skjúrta og slips

Tú verður biðin um sjálv/ur at møta til arbeiðis í svørtum skóm og svørtum hosum/nylonsokkum.

# LØN, TRYGGING & STEÐGUR

## LØN, EFTIRLØN OG SETANARTREYTIR

Setanartreytir og løn eru sambært galdandi felags sáttmála á økinum. Sum starvsfólk á Hotel Brandan ert tú sett/ur eftir Gistingarhússáttmálanum. Løn verður útgoldin seinast í hvørjum mánaða. Arbeiðsgevarin flytir eftirlønina, samstundis sum lønarflytingin verður gjørd. Meira kann lesast um sáttmálar á heimasíðuni hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag www.industry.fo
Hevur tú spurningar hesum viðvíkjandi, kanst tú venda tær til tín nærmasta leiðara ella HR-deildina.

## TRYGGING

Sum starvsfólk hjá okkum ert tú tryggjað/ur móti arbeiðsskaðum. Summi fakfeløg hava eina lívstrygging. Tað merkir, at ein ávísur partur av limagjaldinum fer til eina lívs- og vanlukkutrygging. Lesast kann nærri um hetta á heimasíðunum hjá fakfeløgunum.

## MATARSTEÐGUR

Øll starvsfólk hava rætt til ein hálvan tíma matarsteðg fyri hvørjar átta arbeiðstímar. Matarsteðgurin er uttan løn.
Starvsfólkamatur er at fáa í hesum tíðarskeiðum:

10:15 – 10:30 Avlop frá morgunmatarborðinum
14:15 – 14:45 Mánadag til fríggjadag – køkurin ger lættan miðmála
16:30 – 17:30 Starvsfólkamatur, ið køkurin tilreiðir

*Sum starvsfólk hevur tú ábyrgd av at skiftast við tínar starvsfelagar um at hava steðg, soleiðis at tað altíð eru starvsfólk tøk til at veita gestunum eina góða tænastu.*

# VAKTARSKIPAN OG FERIA

## VAKTARSKIPAN OG UMBÝTING AV VAKTUM

Tú møtir upp til ásettu tíðirnar á vaktarskipanini og skalt vera klár/ur at byrja til ásettu tíð. Umbýting av vaktum kann gerast á Planday, og tá er tað leiðarin, ið váttar, um umbýtingin ber til ella ikki.

## FERIA

Tú hevur rætt til feriu sambært galdandi kollektiva sáttmála og frítíðarlóg. Frítíðarárið er frá 01.05 – 30.04 og tú hevur rætt til feriu í 5 vikur. Í samráð við tín leiðara velur tú, hvussu tú ynskir at leggja tína frítíð.

- 1 feriuvika er 5 dagar (mánadag – fríggjadag). Í alt sparir tú 25 dagar upp um árið

- Tú biður um ynskta feriu á Planday. Leiðarin skal vátta umbønina.

## FERIA VIÐ LØN, FASTLØNT

Fyrsta árið í starvi er ferian ikki við løn. Tú sparir tær 2,08 dagar saman pr. mánaða í feriu við løn, sum kann brúkast næsta árið í starvi. Fyrsta árið í starvi kanst tú tó sjálv/ur gjalda fyri feriu. Práta nærri við tín leiðara um hetta. Harumframt fært tú útgoldið serligt frítíðarískoyti á 1,5 % fyrst í mai.

## FERIA UTTAN LØN, TÍMALØNT

Sum tímalønt fært tú ikki løn í feriuni. Í staðin fyri fært tú útgoldið frítíðarpening, sum er 12% av lønini. Frítíðarpeningurin verður útgoldin fyrst í mai.




# INNANHÝSIS POLITIKKUR

## TAGNARSKYLDA

Sum starvsfólk hava vit øll tagnarskyldu um tað, sum hendir á hotellinum (viðvíkjandi okkara gestum og starvsfólki).

- Kamarsnummar og navn á gesti verður ongantíð upplýst óviðkomandi
- Privatur bústaður og tlf. nr. hjá starvsfólki verður ongantíð upplýst óviðkomandi

*Tagnarskyldan er eisini galdandi, tá ið tú ert farin úr starvi.*

## TELDUR/ALNÓT

Loyniorð til internetið fæst í móttøkuni. Teldurnar á hotellinum skulu bert nýtast til arbeiðsbrúk.

## STAFF CARD

Fyri at fáa STAFF CARD skalt tú vera í føstum starvi og/ella starvast meira enn 30 tímar um vikuna. Vend tær til tín leiðara fyri at fáa títt STAFF CARD.

## RÚSEVNI

Tað er ikki loyvt at møta ávirkaður til arbeiðis ella drekka í arbeiðstíð. Brot á rúsevnispolitikkin kann viðføra uppsøgn ella burturvísing. Um starvsfólk hevur trupulleikar av alkoholi ella øðrum rúsandi evnum, ynskja vit á Brandan heldur at hjálpa enn at straffa. Vinarliga boða nærmasta leiðara frá.

## HAPPING

Happing verður ikki góðtikin. Standast trupulleikar av happing, er tað eitt starvsfólkamál, sum hotellið tekur í fullum álvara. (skriva okkurt um kynsliga happing eisini, politikkur er á veg)

## GLOYMDIR LUTIR

Kemur tú fram á gloymdan lut, verður hetta latið móttøkuni við kunning um, hvar tú fanst lutin.




# TRYGDARPOLITIKKUR

## TRYGD

Vit hava ábyrgd av trygdini hjá nógvum fólki, og tí er tað eitt krav, at øll starvsfólk seta seg inn í trygdarviðurskiftini. Kunna teg tí um:

- hvar trygdarútgerðin er
- hvussu trygdarútgerðin verður nýtt
- hvar neyðdyr- og trappur eru

Húsavørðurin tekur teg við á eina trygdarrundferð, har víst verður, hvar neyðdyr, neyðtrappur og trygdaramboðini eru, og hvussu tey verða nýtt. Tú fært somuleiðis eitt trygdarkort, ið vísir, hvat tú skal gera, um t.d. eldur kemur í. Harumframt verða ymisk trygdarskeið boðin út.

Øll kømur á hotellinum eru útgjørd við brandalarmum. Eitt yvirlit av hotellinum er inni á hvørjum kamari, har gesturin kann lesa, hvar neyðdyr og rýmingarvegir eru. Brandútgerðin verður kannað árliga.

## Sjónbandaeftirlit og trygdaravrit av teldukervi

Fyri trygdina á Hotel Brandan, bæði fyri starvsfólk og gestir eru upptøkutól sett upp við allar atkomuvegir til hotellið og í móttøkuni. Um tað skuldi komið fyri at herverk, stuldur ella óreglusemi fer fram á hotellinum, verða sjónbondini kannaði. Av trygdaráðum verður somuleiðis hvørja nátt tikið trygdaravrit av øllum hendingum, sum eru farnar fram á teldukervinum.




# UMHVØRVISPOLITIKKUR

VIT ANSA EFTIR UMHVØRVINUM OG HAVA M.A.
TIKIÐ STIG TIL HESI ÁTØK:

- Battaríir verða samlaði inn í móttøkuni og beind burtur á rættan hátt
- Fløskur verða seldar til endurnýtslu, og papp verður samlað og pressað í skrellirúminum til endurnýtslu
- Reingerðarevni og útgerð eru umhvørvisvinarlig
- Gistir gesturin í meira enn eina nátt verða handklæðini skift, tá ið gesturin ynskir tað
- Pappkoppar eru úr endurnýtslupappíri
- Spariperur verða nýttar, har møguleiki er fyri tí
- Flestu gólvteppi á Hotel Brandan eru gjørd úr endurnýtsluplasti
- Súgvirør eru gjørd úr kopari
- Avmarkað nýtsla av plastgløsum, og tey vit nýta, eru biodynamisk
- Hevur tú hugskot til umhvørvistiltøk, vinaliga vend tær til leiðaran

# SJÚKULEIÐREGLUR

Um tú kvøldið áðrenn eina vakt kennir teg illa fyri og ivast í, um tú kanst koma til arbeiðis, royn tá at finna onkran at taka tína vakt. Tá ið tú hevur funnið ein at taka vaktina fyri teg, boða so tínum leiðara frá hesum.

Ring til leiðaran og boða frá sjúku. Eini sms-boð eru ikki nóg mikið, tí at tað er ikki vist, at leiðarin sær boðini beinanvegin. Um tú ikki ført fatur á leiðaranum, skalt tú ringja til móttøkuna og boða frá.

Verður tú sjúkrameldað/ur í fleiri enn 3 dagar, skal sjúkraváttan latast leiðaranum.

Við drúgvari sjúku kanst tú vænta, at leiðarin setur seg í samband við teg fyri at hoyra, um tað er okkurt leiðarin kann gera, og fyri at vita nær tú væntar at koma aftur. Um tað er neyðugt at tínar arbeiðsuppgávur skulu broytast, skalt tú siga leiðaranum ella HR-deildini frá.

Tímalønt og næmingar hava ikki rætt til løn í sjúkutíðarskeiðnum, men kunnu søkja um lønarendurgjald fyri mista inntøku á www.av.fo.

## HEIMA HJÁ SJÚKUM BARNI

Loyvt er at vera heima hjá sjúkum barni/børnum tveir teir fyrstu sjúkudagarnar, um børnini eru yngri enn 14 ár, tó í mesta lagi 10 dagar um árið. Er talan um serliga støðu, verður tú biðin um at seta teg í samband við tín leiðara. Tímalønt hava ikki rætt til løn í sjúkutíðarskeiðnum, men tú kanst søkja um lønarendurgjald fyri mista inntøku, fyri 1. og 2. sjúkradag á www.av.fo.

## BARNSBURÐARFARLOYVI

Tú hevur rætt til barnsburðarfarloyvispening frá barsilsgrunninum. Tú søkir við at fylla ein frymil út á www.barsil.fo. Umsóknarfreistin er 1 ár, eftir at barnið er føtt. Umsóknir verða tó viðgjørdar, tá ið farloyvið byrjar, so best er at senda umsóknina sum skjótast. Á heimasíðuni www.barsil.fo fæst meira at vita um barnsburðarfarloyvi og hvussu tú søkir.


HOTEL BRANDAN
Eg eri eisini online
FLOWCODE
PRIVACY.FLOWCODE.COM
@hotelbrandan
@húsagarður